# Hugskotskapping um Norðurbryggjuna

**Skrivað er nú út almenn hugskotskapping um føroyska partin av umboðs- og mentanardeplinum, Norðurbryggjuni, í Keypmannahavn**

MENTAN
*Turið Kjølbro*

Ætlanin um norðurlendska miðdepilin á Den Grønlandske Handels Plads í Keypmannahavn, Norðurbryggjan sum depilin eitur, er komin enn eitt stig longur. Arkitektafelag Føroya boðar nú til almenna hugskotkapping, har føroyski parturin av Norðurbryggini skal innrættast.

Norðurbryggjan er verkætlan um eina felags grønlendska, íslendska og føroyska umboðs- og mentanarmiðstøð. Danski staturin hevur latið verkætlanini 7000 fermetra stóra pakkhúsið frá 1763, sum verður mett til 40 mió. krónur, á Den Grønlandske Handels Plads við teirri treyt, at nevndin fyri verkætlanina megnar at útvega restina av peninginum, sum verkætlanin kostar. Fyrst í hesum árinum kunngjørdi forkvinnan í nevndini, Vígdis Finnbogadóttir, fyrrverandi forseti í Íslandi, at verkætlanin er tryggjað búskaparliga og at hon nú hvílur í sær sjálvari. Hetta kemst av, at grunnurin hjá A.P. Møller,»A.P. Møller og Hustru Chastine Mærsk-McKinney Møllers Fond til Almene Formaal«, hevur játtað verkætlanini 20 mió. krónur í stuðli. Somuleiðis stjórnirnar í Íslandi, Føroyum og Grønlandi hava játtað at latið pening til endamálið. Samstundis hevur nevndin fingið tilsøgn um lán til umvælingarnar, sum eru mettar at kosta 50 mió. krónur.

## Samhandil

Pakkhúsið á Den Grønlandske Handels Plads varð upprunaliga nýtt í sambandi við samhandil millum Grønland, Ísland, Føroya, Finnmarkar og Danmarkar. Her eru turri fiskurin og hvalirnir skipaðir inn. Skip hava lagt at, og tað krevur ikki nógv hugflog at ímynda sær tann ruðuleika av lívi og handli, sum er farin fram har. Sjálvt pakkhúsið er væl hildið við líka takkað verið góða viðinum og byggisiðinum, sum var tá. Tað hevur staðið tómt síðani fyrst í áttati árunum, tá ið tann kongligi grønlendski handilin fór út og tók síðstu vørurnar í stóra goymslubygninginum við sær.

Tá ið umvælingarnar eru fingnar frá hondini skuldi hesin stóri bygningurin staðið klárur at hýst øllum teim mentanarligu brigdunum úr Grønlandi, Íslandi, Føroyum og Danmark. Ætlanin er, at vinnulívið skal vera primus motor í menningini av húsinum, tá ið tað stendur liðugt. Nevndin roknar við, at umleið 75 prosent av húsinum verða leigað út til vinnulig endamál úr Norðuratlantshavi. Hini 25 prosentini av húsinum skulu brúkast til feløg, søvn, stovnar og hvat ein annars kann ímynda sær av norðuratlantiskum felagsskapum, sum í løtuni eru spjaddir um alt Keypmannahavn. Her verður alt savnað. Umframt vera kaffistovur, framsýningar og serbúðir.

Tað er Morten Meldgaard, leiðari á Dansk Polarcenter, sum er upphavsmaðurin til verkætlanina.



*- Eg veit, at Norðurbryggjan í framtíðini fer at eiga ein stóran leiklut í menningini av teim sterku bondunum, sum eru millum okkara lond, sigur Vígdis Finnbogadóttir, forkvinna í nevndini fyri Norðurbryggjuna*

# Tveir nýggir firvaldar funnir í Føroyum



*Músarvongur*

*Eikispannari*



*Eikispannari og músarvongur eita hesir báðir firvaldarnir, sum vóru funnir í fjør. Jens-Kjeld Jensen hevur tikið myndirnar*

**Tað eru teir báðir músarvongur og eikispannari, sum vórðu funnir ávikavist í Hoyvík og Nólsoy seinasta heyst**

FIRVALDAR
*Turið Kjølbro*

Ikki færri enn 113 sløg av firvaldum halda til í Føroyum. Hetta stendur í áhugaverdari grein, sum stendur at lesa í ritinum hjá Føroya Fuglafrøðifelag, sum júst er útkomið. Greinina, ið er brot úr føroysku firvaldasøguni, hevur Annleyg Patursson skrivað. Har verður Leif Dahl nevndur. Hann starvaðist í Føroyum sum lækni í tvey tíðarskeið í fýrati- og fimti árunum, og var tann fyrsti, sum fór undir at kanna firvaldalív okkara.

Í 1937 vóru 32 firvaldar skrásettir og í 1956 vóru 22 firvaldar komnir afturat. Alt bendir á, at Leif Dahl sjálvur setti føroysk nøvn á firvaldarnar. Í 1982 varð savnið hjá Leif Dahl ognað Føroya Náttúrugripasavni.

Næstu 30 árini varð gott sum einki gjørt fyri at kanna føroyska firvaldalívið, men í nítiárunum vóru firvaldar aftur á skránni. Tá vórðu ljósfellur settar upp runt í landinum og fólk á staðnum tømdu tær eina ferð um vikuna. Danin dr. Svend Kaaber stóð fyri kanningini og í 1997 kunngjørdi hann ein lista. Aftur í 1998 varð ein listi gjørdur yvir firvaldarnar í Føroyum, hesa ferð vóru tað Jens-Kjeld Jensen og Annleyg Patursson, sum gjørdu listan. Og á hesum listanum vóru tríggir firvaldar, sum ikki eru á listanum hjá Kaaber.

Í fjør vóru tveir nýggir firvaldar funnir. Teir eru músarvongur, som kom í ljósfelluna hjá Annleyg Patursson í september, og eikispannari, sum Jens-Kjeld Jensen fangaði í Nólsoy á mikkjalsmessu. Talið á firvaldum í Føroyum er sostatt 113.

Annleyg Patursson sigur í greinini, at tað er forvitnisligt at síggja, hvussu stórur munur er á hvørjir firvaldar halda til á teimum ymsu plássunum. Tað eru heilt onnur sløg av firvaldum, sum eru vanlig í Sumba, enn norðanfjørðs. Eisini er stórur munur á, hvørji eru í Nólsoy og hvørjir eru í Hoyvík. Tað ger tað ivaleyst meiri spennandi at kanna og skráseta firvaldar í Føroyum.



# Gera nógv burtur úr ábyrgdarafundi



*Norðoya Sparikassi hevur formliga kunning, fyrilestur, tónleik og annað undirhald á ábyrgdarfundinum, sum verður 23. mars*

**Um tvær vikur hevur Norðoya Sparikassi ábyrgdarfund, har nógv verður gjørt burtur úr skránni**

TILTAK
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Kunning og undirhald er á skránni, tá Norðoya Sparikassi fríggjakvøldið 23. mars hevur ábyrgdarfund í KÍ-høllini í Klaksvík.

Hetta er afturvendandi tiltak, sum sparikassin hevur havt annaðhvørt ár síðani 1995.

Norðoya Sparikassa er sjálvsognarstovnur, og skipanin við ábyrgdarum er gomul. Ábyrgdararnir hava ávirkan á leiðsluna í stovninum, tí teir velja umboðsráðið, sum síðani setir leiðsluna í sparikassanum.

Í 90'unum lat Norðoya Sparikassi meira upp fyri, at fólk gjørdust ábyrgdarar, og nú roynir sparikassin at fáa síni viðskiftafólk at verða ábyrgdarar.

## Gera nógv burtur úr

Teir mongu ábyrgdararnir sleppa 23. mars á fund, og har fáa teir eina kunning um viðurskifti í sparikassanum, men samstundis verður eisini nógv undirhald.

– Vit hava valt at lata okkara formligu kunning til ábyrgdararnar á ábyrgdarfundinum, tá vit so samstundis gera nakað serligt burtur úr, sigur Gunnar Nolsøe, marknaðarleiðari í Norðoya Sparikassa.

Durita Holm fer at halda fyrilestur um at ferðast kring knøttin, Ad Libitum, Vísumenn og onnur fara at hava tónleikaundirhald, og skemt er eisini á skránni.

Seinast ábyrgdarfundur var, vóru eini 650 fólk á fundi.

# Bjóða Kráarbrekku út

**Arbeiðið at gera eldraíbúðir undir Kráarbrekku í Klaksvík er nú boðið út**

ÚTBJÓÐING
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Sjálvsognarstovnurin undir Kráarbrekku hevur nú boðið arbeiðið at gera eldraíbúðir út alment.

Arbeiðið er boðið út í sjey pørtum – Jørð, kloakk- og betongarbeiði, Timbur- og snikkaraarbeiði, múraraarbeiði, málaraarbeiði, gólvarbeiði, HVS-arbeiði og el-arbeiði.

Útbjóðingartilfarið fekst frá Fuglø Arkitektum til í gjár. Lisitatiónin verður hildin mánadagin 2. apríl. Tá verða boðini latin upp, og tey, sum hava bjóðað, kunnu verða hjástødd.

Leiðslu og eftirlit av arbeiðnum hava Fuglø Arkitektar, Sámal Johannesen, Sofus M. Jakobsen og Oddbjørn Vágslíð.

# Tann øðrvísi møguleikin

**Tekniski skúli í Klaksvík bjóðar sum einasti skúlin í landinum tekniska studentsútbúgving**

Síðani 1993 hava føroyskir ungdómar havt møguleikan at taka miðnámsútbúgving á Tekniska skúla í Klaksvík.

Talan er um tekniskar studentar, har undirvísingin er ein blanding av bókligum og verkligum lærugreinum. Ein triðingur av frálæruni fer fram á einum av verkstaðunum á skúlanum.

Útbúgvingin tekur trý ár. Í løtuni er ein flokkur í hvørjum árgangi, og tilsamans eru 22 næmingar í holt við útbúgvingina.

Tekniska studentsútbúgvingin gevur teir somu møguleikarnir fyri víðari útbúgving sum tilsvarandi útbúgvingar – HF, student og handilsskúli.

## Munur á útbúgvingum

Næmingarnir, sum ganga á Tekniska skúla í Klaksvík, koma úr øllum landinum, og møguleiki er at búgva á skúlaheiminum, sum hoyrir til skúlan.

Munurin millum tekniskú studentsútbúgvingina og hinar miðnámsútbúgvingarnar er, at størri dentur verður lagdur á verkligu lærugreinarnar. Næmingarnir sleppa at royna seg við timbri, el, á maskinverkstaði og í starvsstovu.

Næmingarnir hava stóra ávirkan á, hvussu útbúgvingin fer fram, tí tað eru nógvir valmøguleikar. Skúlin leggur dent á, at næmingarnir sleppa at royna seg, og at teir fáa møguleikan at menna seg.

Skúlin leggur upp til, at næmingarnir sleppa at brúka bæði bókligu og handaligu vitanina í tvørfakligum uppgávum.

Leygardagin hevur Tekniski skúli í Klaksvík opið hús, og tá ber til at hyggja eftir umstøðunum og at kunna seg við viðurskiftini á skúlanum.

